# SKIPAN AV TILBOÐI UM ÓKEYPIS SÁLARFRØÐILIGA VIÐGERÐ

TILMÆLI TIL LANDSSTÝRISKVINNUNA Í HEILSU- OG INNLENDISMÁLUM

## INNGANGUR

Í Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu í Føroyum, sum varð handað landsstýriskvinnuni hin 10. oktober 2018, er eitt tilmæli, ið snýr seg um at veita ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Tilmælið er soljóðandi:

**Arbeiðsbólkurin mælir til, at farið verður undir at skipa eitt tilboð um lætta og skjóta atgongd til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð í primera geiranum. Tilboðið skal grundast á bestu royndirnar frá øðrum londum og verða lagað til føroysk viðurskifti. Til ber at byrja í smáum, eins og gjørt verður í okkara grannalondum Onglandi, Noregi og Danmark.**

Landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg, gjørdi um ársskiftið av at seta ein arbeiðsbólk undir leiðslu av Heilsu- og innlendismálaráðnum til at gera tilmæli um skipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð.

Í Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu verður víst á, at nógv er at hava í huga, áðrenn ein slík skipan verður roynd í Føroyum. Eitt nú hvørjar málbólkar átakið skal fevna um, hvussu fólk skulu útgreinast og ávísast til sálarfrøðiliga viðgerð, hvørji førleikakrøvini eru til tey, ið fremja sálarfrøðiligu viðgerðina, og hvussu dygdin verður tryggjað í slíkum átaki. Eisini verður í heildarætlanini mint á, at felags fyri tær royndir við ókeypis sálarfrøðiligum viðgerðum, sum vit síggja í okkara grannalondum, er, at hesar skipanir eydnast frægast, um tær verða settar í verk í stigum.

***Arbeiðssetningur***

- Lýsa verandi skipan við sálarfrøðiligum tænastum í Føroyum og meta um tørvin at gera broytingar í skipanini
- Lýsa skipanir við ókeypis sálarfrøðiligum tænastum í øðrum londum: m.a. Bretlandi, Norra, Danmark og Íslandi og/ella øðrum.
- Gera tilmæli um nýggja føroyska skipan við ókeypis sálarfrøðiligum tænastum
    - hvørjar málbólkar skal skipanin fevna um
    - hvussu skulu fólk ávísast, og hvør skal viðgerðin verða
    - hvussu verður dygdin tryggjað
    - hvussu kann ein tílík skipan skipast
    - hvussu kann ein tílík skipan setast í verk í stigum, undir hesum lýsa fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar.

***Arbeiðsbólkur***

Í arbeiðsbólkinum hava sitið Fróði Jacobsen fyri Heilsu- og innlendismálaráðið, sum varð formaður. Annika Helgadóttir Davidsen og Suni Poulsen umboðaðu Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, og Petur Martin Hansen

umboðaði Heilsutrygd. Í tilgongdini hevur arbeiðsbólkurin havt fundir við umboð fyri Sinnisbata, Barna- og ungdómspsykiatriina, Sernám og umboð fyri kommunulæknarnar.

# SAMANUMTØKA

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð á fleiri fundum í vár. Í hesum tilmæli verður greitt frá okkara niðurstøðu. Yvirskipað er okkara niðurstøða og tilmæli soljóðandi:

---

- Arbeiðsbólkurin kann staðfesta, at galdandi skipan við sálarligari viðgerð er ikki nóg dygg
- Stórir bólkar av menniskjum við sálarligum avbjóðingum fáa onga hjálp. Tað hevur stórar avleiðingar fyri hin einstaka, avvarðandi og eisini er samfelagsligi kostnaðurin stórur
- Neyðugt er við einari nýskipan av skipanini við sálarfrøðiligari viðgerð í Føroyum
- Arbeiðsbólkurin mælir til, at farið verður undir eina 3 ára royndarskipan undir Heilsutrygd við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð fyri ung og vaksin í aldrinum 15-35 ár, sum stríðast við angist ella lættari til moderat tunglyndi. Kommunulækni skal ávísa til skipanina.
- Metti kostnaðurin av royndarskipanini er í miðal 3 mió. krónur um árið í trý ár

---

# LÝSING AV VERANDI SKIPAN VIÐ SÁLARFRØÐILIGUM TÆNASTUM Í FØROYUM

Í Føroyum eru ein røð av sálarfrøðiligum tænastum til børn og vaksin. Arbeiðsbólkurin fer ikki at greiða frá øllum teirra, men savna seg um tær tænastur, sum vit meta hava størstan týdning í mun til arbeiðssetningin.

Tað er týðandi at gera greitt beinanvegin, at tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð ikki kann koma ístaðin fyri eitt nú psykiatriina.

Psykiatriin veitir tænastur til tey børn, ung og vaksin, ið stríðast við álvarsligar sálarligar avbjóðingar. Her er aloftast tørvur á fjøltáttaðari viðgerð, sum umframt sálarfrøðiliga viðgerð, t.d. kann fevna um innleggjan á seingjadeild, heilivág, fysio- og ergoterapi og sosialar tænastur.

Hinvegin vil ein slík skipan koma afturat og vera við at menna samlaða útboðið av sálarfrøðiligum viðgerðum í Føroyum. Eitt serligt framstig í hesi skipan í mun til onnur tilboð er, at viðgerðin verður uttan kostnað fyri borgaran.

Sum er verða fleiri sálarfrøðiligar tænastur veittar sum fyribyrgjandi fyriskipanir í barnaverndarhøpi, og sálarfrøðilig ráðgeving verður eisini veitt í Sernámi, men tá er talan ikki um viðgerð. Eisini eru sálarfrøðingar knýttir at fleiri sjálvhjálparbólkum, umframt at sálarfrøðilig viðgerð er ein týðandi táttur í allari rúsviðgerð.

Men bulurin í sálarfrøðiligu viðgerðini til føroyingar er helst teir privatstarvandi sálarfrøðingarnir, sum hava sáttmála við Heilsutrygd.

Føroyska skipanin við sálarfrøðiligari viðgerð er rættiliga lík tí donsku skipanini á økinum, og varð av fyrstan tíð sett í verk í ár 2000. Skipanin er ætlað persónum, sum hava verið út fyri ávísum hendingum. Treytin fyri at fáa ískoyti til gjald fyri sálarfrøðiliga viðgerð er, at kommunulækni metir, at persónurin hevur verið fyri einari av teimum tilsamans níggju hendingunum, sum eru ásettar í kunngerð. Metir kommunulæknin, at so er, kann hann ávísa viðkomandi til sálarfrøðiliga viðgerð. Tá letur Heilsutrygd eitt fíggarligt ískoyti á 40% av gjaldinum.

Treytin fyri sálarfrøðingar at virka eftir sáttmálanum er, at sálarfrøðingurin hevur eina løggilding og hevur royndir innan tær níggju hendingarnar.

Skipanin varð seinast dagførd í 2011 við kunngerð og nýggja sáttmálanum millum felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Heilsumálaráðið um fíggjarligt ískoyti til sálarfrøðiliga viðgerð. Stórvegis broytingar vórðu ikki framdar, tó at ein hending kom afturat og aðrar smávegis broytingar vórðu gjørdar.

Tær níggju hendingarnar eru:

- Ráns-, harðskaps- og neyðtøkuoffur
- Ferðslu- og vanlukkuoffur
- Avvarðandi til álvarsliga sálarliga sjúk fólk
- Fólk, rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku
- Avvarðandi til fólk, sum eru rakt av álvarsligari avlemjandi sjúku
- Avvarðandi við andlát
- Fólk, sum hava roynt sjálvmorð og/ella hótt við sjálvmorði
- Kvinnur, sum hava fingið framt fosturtøku eftir 12. viku
- Fólk, sum hava verið fyri kynsligum ágangi, áðrenn tey fyltu 18 ár.

Í Danmark eru fleiri broytingar framdar, síðan skipanin varð sett í verk í Føroyum. Eitt nú eru fleiri hendingar komnar afturat, m.a. strongd, tunglyndi og angist. Í juli 2018 kom í gildi royndarskipan við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð fyri tey 18-20 ára gomlu, sum fingu ávísing fyri angist og tunglyndi. Royndarskipanin er fram til ársskiftið 2021-22. Okkara skipan fevnir ikki um hesar hendingar.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt fyrimunir og vansar við galdandi skipan saman við Heilsutrygd, sum varðar av skipanini. Samanumtikið er styrkin við galdandi skipan, at hon er opin og væl regulerað. Tørvur er tó á at dagføra skipanina, tí hon er stirvin og í nøkrum førum ótíðarhóskandi. Semja er um, at skipanin við teimum níggju hendingunum má broytast, tí nógv bendir á, at veruligu orsøkirnar til at eitt ávíst tal av persónum fáa sálarfrøðiliga hjálp, eru fjaldar í hendingunum. Tað vil siga, at hagtølini ikki vísa eina rætta mynd yvir fólk, ið fáa sálarliga hjálp gjøgnum hesa skipan.

***Samanumtøka núverandi skipan: Núverandi raðfesting av sálarligari heilsu er ikki nøktandi***
Sálarlig líðing er eins verulig sum likamlig pína. Sálarlig líðing kann enntá vera meira lemjandi enn likamlig. Kortini vera hesi tvey sløg av líðing ikki viðgjørd eins. Um tú brýtur armin, fært tú viðgerð, men um okkurt bagir sálarliga, fært tú oftani onga hjálp í boði. Hetta er at fremja stigma.

Hetta er ein mismunur, sum søguliga hevur eyðkent tey flestu heilsuverkini kring heimin. Orsøkin er ikki, at tær góðu viðgerðirnar ikki finnast, tí vit hava sera góðar viðgerðir fyri tær mest vanligu sálarligu avbjóðingarnar tunglyndi og angist. Viðgerðirnar – sálarfrøðilig viðgerð og heilivágur um neyðugt – eru ikki kostnaðarmiklar, og búskaparligi vinningurin við hesum viðgerðum er stórur. Hetta koma við nærri inn á seinni.

# ROYNDIR UTTANLANDS: ÍLØGUR Í ÓKEYPIS SÁLARFRØÐILIGA VIÐGERÐ SPARA SEG INNAFTUR

Vánalig sálarlig heilsa er ein stór samfelagslig avbjóðing. Í uppgerð frá WHO er niðurstøðan, at vánalig sálarlig heilsa fevnir um umleið 38 prosent av allari sjúku í ríku londunum:




Í USA, Bretlandi og Evropa stríðist ein av seks við tunglyndi, lemjandi angist ella aðrar sálarligar avbjóðingar. Umleið triðja hvør familja hevur onkran, sum stríðist við sálarligar avbjóðingar (tøl frá Oxford Universiteti í samstarvi við ST).

Samstundis vísa tøl gjøgnumgangandi, at bróðurparturin ikki fær hóskandi viðgerð. Henda gjógv millum tørv og nøktandi viðgerð er eisini galdandi í framkomnum londum so sum USA og Bretlandi.

Afturat hesum kemur, at viðgerðin oftast er heilivágur, hóast heilsumyndugleikar viðmæla sálarfrøðiliga viðgerð sum fyrsta val fyri mest útbreiddu avbjóðingarnar, so sum angist og lætt til moderat tunglyndi – umframt at flestu borgararnir sjálvir ynskja sálarfrøðiliga viðgerð fram um heilivág.

***Alt fleiri lond byrja at bjóða ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð***

Omanfyri standandi er bakgrundin fyri, at fleiri av okkara grannalondum gjøgnum tey seinastu árini, hava framt stórar íløgur í ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Kendastu dømini eru Bretland, Norra, Svøríki og Holland, men eisini verða royndir gjørdar í eitt nú Danmark, sum longu nevnt, og í Íslandi.

Høvuðsorsøkin er sjálvandi, at fólk sleppa av við líðingina og koma fyri seg. Men hvat kostar tað samfeløgunum at fremja hesar íløgur?

Fleiri og stórar greiningar koma til somu niðurstøðu, at ókeypis sálarfrøðilig viðgerð meira enn sparir seg inn aftur, við at fólk koma aftur til arbeiðis.

Í mun til flestu likamligu fólkasjúkurnar, so raka sálarligu avbjóðingarnar í stóran mun borgarar í arbeiðsføra aldrinum. Avbjóðingarnar eru orsøk til, at fleiri borgarar eru uttan arbeiði, og at fleiri eru noyddir at arbeiða niðursetta tíð. Harafturat er sálarlig óheilsa mett at vera orsøk til umleið 40 prosent av allari sjúkrafráveru.

***Minni nýtsla av heilsutænastum fyri likamliga sjúku - minni nýtsla av hospitalspsykiatri***

Afturat hesum kemur, at fólk við sálarligum avbjóðingum í størri mun nýta likamligar heilsutænastur samanborið við borgarar við góðari sálarliga heilsu, men sum annars hava somu likamligu heilsustøðu. Í granskingini er víst á, at meirnýtslan er á umleið 50%.

Orsøkirnar eru m.a., at tey, sum stríðast við sálarligar avbjóðingar, hava lyndi til minni virknan lívsstíl, fleiri ósunnar vanar, umframt at stúran í sær sjálvum kann vísa seg sum likamlig sjúkueyðkenni. Granskingin vísir, at fáa hesir borgarar hjálp til teirra sálarligu avbjóðingar, so sparir tað seg meira enn inn aftur í lægri nýtslu av teimum likamligu heilsutænastunum.

Tað er ikki torført at skilja, at alt fleiri lond í vesturheiminum gjøgnum 00'ini og framhaldandi gera risastórar íløgur í skjóta og ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð. Í Bretlandi hevur leingi verið sagt, at ein króna í tílíkar verkætlanir gevur minst tvær krónur aftur til samfelagsbúskapin. Ein nýggj kanning úr Danmark millum ung vísir, at hvør króna til ókeypis, sálarfrøðiliga viðgerð í primera geiranum sparir 3,5 krónur, bara í mun til hospitalspsykiatri.

# TILMÆLI: ÓKEYPIS VIÐGERÐ FYRI ANGIST OG LÆTT/ MODERAT TUNGLYNDI TIL TEY MILLUM 15-35

Tað ber ikki til alt fyri eitt at bjóða ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til allar borgarar. Tað tekur tíð at byggja tænastuna upp, at góðskutryggja viðgerðina og at fáa fígging til vega.

Felags fyri londini, sum annaðhvørt longu bjóða ókeypis viðgerð ella eru í ferð við at uppbyggja eina slíka skipan, er, at tey øll byrja við angist, umframt løttum til moderatum tunglyndi. Hesar diagnosur eru nógv tær størstu og fevna um umleið helvtina av sálarligari óheilsu. Harnæst er sálarfrøðilig viðgerð fyri júst angist og tunglyndi vísindaliga væl undirbygd. Umleið helmingurin av teimum, sum fáa viðgerð, gerast frísk, og ein partur afturat fær ein lætta, ið merkist, tó uttan at sleppa av við øll eyðkenni. Hesi úrslit eru samanberilig við flestu úrslitagóðu viðgerðirnar í heilsuverkinum.

Í fyrstu syftu er eisini neyðugt at avmarka tænastuna í mun til aldursbólkar. Londini kring okkum, sum arbeiða við tílíkum tilboðum, byrja øll við einum tilboði til yngru aldursbólkarnar. Hetta er gjørt við tí í huga, at tess fyrr sett verður inn, tess størri er effektin gjøgnum lívið hjá borgaranum. Ein væleydnað viðgerð hjá einum tannáringi kann fyribyrgja fleiri tilburðum gjøgnum lívið og/ella fyribyrgja, at støðan versnar til meira lemjandi sálarliga sjúku.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at farið verður undir:

1) eina trý ára royndarskipan

2) ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð

3) tilboð til ung og vaksin í aldrinum 15 til 35 ár

4) tilboð til tey, ið stríðast við angist og lætt til moderat tunglyndi.

***Sniðgeving av tænastu***

Tað er avgerandi, at tænastan verður væl fyrireikað, framhaldandi góðskutryggjað og neyvt eftirmett. Tí skal sálarfrøðingur setast sum verkætlanarleiðari, hálva tíð og í trý ár fyri at fyrireika, reka og eftirmeta tilboðið. Verkætlanarleiðarin skal eisini standa fyri at fáa til vega hagtøl yvir, hvussu tænastan og viðgerðirnar eydnast.

Annars í mun til ítøkiliga sniðgeving av tænastuni:

- Skipanarliga skal royndarskipanin liggja undir Heilsutrygd
- Viðgerar eru sálarfrøðingar við løggilding, eins og í núverandi skipan undir Heilsutrygd. Sálarfrøðingar uttan løggilding kunnu gerast partur av skipanini í tøttum samstarvi við løggildan sálarfrøðing
- Sálarfrøðingurin velur sjálv/ur sína tilgongd í mun til viðgerð; treytin er tó, at hátturin er "bona fide", t.e. at hann er ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar, av fakfólki við neyðugu førleikunum og útbúgvingarstigi
- Tað er gjørligt hjá viðskiftafólkinum at skifta sálarfrøðing í viðgerðini
- Viðgerðin fevnir um upp til 12 avtalur; hetta kann vera einstaklinga- ella bólkaviðgerð
- Í 3 ára royndarskipanini koma ávísingarnar til tænastuna gjøgnum kommunulækna

Arbeiðsbólkurin metir, at tað tekur umleið tríggjar mánaðir hjá verkætlanarleiðaranum saman við Heilsutrygd at samskipa tilboðið, áðrenn tað kann setast í verk.

Viðvíkjandi spurninginum um ávísing umvegis kommunulækna, so ger hetta í roynd og veru tænastuna til part av sekundera geiranum. Í londunum kring okkum eru sálarfrøðingar í alt størri mun partur av primera geiranum.

Í Norra og Onglandi t.d. ber tað til hjá borgarunum at venda sær beinleiðis til tænastuna við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð. Og harumframt seta alt fleiri lond sonevndar "kommunupsykologar", sum borgarar kunna venda sær til beinleiðis í mun til sálarligar avbjóðingar, og sum so útgreina, ráðgeva og kanska vísa víðari til viðgerð ella aðra útgreining. Royndirnar eru góðar, og hetta er upplagt partur av framtíðar menning av

primera geiranum í Føroyum eisini. At borgarin kann venda sær beinleiðis til sálarfrøðingin minkar bæði um gáttarhæddina og heildarkostnaðin.

Í mun til 3 ára royndarskipanina er tað týdningarmiklasta í fyrstu syftu at uppbyggja eina góðskutryggjaða tænastu. Júst hvussu kommunulæknar ávísa til nýggju tænastuna, er ein spurningur, sum felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Kommunulæknafelag Føroya finna útav, áðrenn tilboðið verður sett í verk.

***Skitsa til ítøkiliga tíðarætlan og uppgávur***

1. **1. ársfjórðingur 2020** – søkt verður eftir sálarfrøðingi sum verkætlanarleiðara, hálva tíð, til at uppbyggja, reka og eftirmeta skipanina. Verkætlanarleiðarin skal setast undir Heilsutrygd.

2. **2. ársfjórðingur 2020 -** verkætlanarleiðarin fyrireikar tænastu, herímillum:
    a. Sniðgevur ætlanina fyri, hvussu borgarar verða mettir áðrenn, ímeðan og aftaná viðgerð – t.d. hvørji dáta verður noterað, hvørji amboð og spurnarbløð verða nýtt, og hvørjar fortreytirnar eru fyri at avvísa ella vísa viðskiftafólki víðari
    b. Fyrireikar sálarfrøðingarnar, ið skulu viðgera – er viðgerðar-kapasiteturin í lagi, hvussu taka sálarfrøðingarnir ímóti ávísingum, og hvussu viðgerarnir skulu samskifta við Heilsutrygd og kommunulæknar
    c. Fyrireikar kommunulæknaskipanina – hvør málbólkur skal ávísast, hvørjar metingar skulu við frá kommunulækna til viðgerandi sálarfrøðingin, hvat hoyra kommunulæknar aftur um viðgerðina, og hvørjar væntanir eru um "likamligar kanningar" í sambandi við klagu um sálarliga avbjóðingar
    d. Framleiðir og metir um kunningar- og møguligt lýsingartilfar í sambandi við tilboðið.

3. **3. ársfjórðingur 2020 til og við 4. ársfjórðing 2022** – tilboðið koyrir, verkætlanarleiðarin:
    a. Hevur yvirlit yvir, um skipanin koyrir sum hon skal, og handfer spurningum uttaneftir
    b. Hevur samband við viðgerarnar í mun til møgulig ivamál og avbjóðingar – herímillum eftirlit í mun til kapasitet, soleiðis at langar bíðitíðir ikki stinga seg upp, umframt at greina støðuna, um mett verður hinvegin, at ov lítil aktivitetur er í skipanini
    c. Hevur samband við kommunulæknarnar í mun til, hvussu teir meta, at skipanin virkar
    d. Ger ein leist í mun til at eftirmeta royndartíðina – og kannar mest uppløgdu møguleikarnar fyri at nýta dáta til granskningarverkætlanir.

4. **1. ársfjórðingur 2022** – eftirmeting
    a. Frágreiðing
        i. Hvør og hvussu nógv hava fingið viðgerð?
        ii. Hvat hava tey fingið burturúr í mun til betran av sálarligari heilsu?
        iii. Hvussu meta viðskiftafólk, viðgerar, kommulæknar og aðrir viðkomandi stovnar skipanina?
        iv. Niðurstøða um, hvussu skipanin virkar, og hvussu hon best verður ment framyvir – herímillum neyv samanbering av úrslitum í okkara grannalondum, t.d. Norra og Stórabretlandi.

***Krøv í mun til fígging***

Samanbera vit okkum við okkara grannalond, so er eitt gott boð, at umleið 4 prosent av føroyingum aktuelt stríðast við angist, og onnur 4 prosent stríðast við tunglyndi – harav umleið 3 prosent við lætt til moderat tunglyndi.

Tilboðið um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð fevnir um upp til 12 avtalur. Í royndum er tað tó stórur munur á, hvussu nógvar avtalur, fólk ynskja og/ella hava tørv á. Miðaltalið av avtalum í norsku tænastuni er 5 til 6, og í Stórabretlandi eru nýggjastu tølini eitt vet hægri – uml. 7 avtalur í miðal.

Harumframt søkja ikki øll viðgerð, sum lúka diagnostisku krøvini til angist ella lætt til moderat tunglyndi. Tað er ongantíð hent í nøkrum av undangongulondunum. Síðani er ein partur, ið ynskir aðrar viðgerðarhættir: heilivág ella viðgerðir á meira likamligum grundarlagi við fokus á t.d. rørslu, kost og hvíld.

Arbeiðsbólkurin metir, at talið á teimum, ið fara at taka av nýggja tilboðnum um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð í mesta lagi verður 60 prosent av øllum í málbólkinum. Verður miðaltali av avtalum sett til 7, og taksturin settur á sama støði sum í Danmark, so gevur hetta ein miðalkostnað á kr. 6.130,03 fyri hvørja viðgerð.

Við hesum fortreytum er metti kostnaðurin 3,3 mió. um árið fyri eina tænastu við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til ung og vaksin í aldrinum 15 til 35 ár. Mett verður, at fleiri enn 500 borgarar kunnu gerast frískir frá sálarligari líðing, og at 150+ koma at uppliva markantan lætta.

Fyrivarni skal tó takast fyri, at felagið Føroyskir Sálarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið skulu samráðast um endaligan takst. Ítøkiligt eru mettu fíggjarligu útreiðslurnar:

Fyrsta árið: 1.650 túsund fyri viðgerðirnar + 260 túsund (verkætlanarleiðari). Tilsamans 1.910 túsund krónur
Annað árið: 3.300 túsund + 345 túsund. Tilsamans 3.650 túsund krónur.
Triðja árið: 3.650 túsund krónur (saman sum annað árið)
Tilsamans: 9.210 túsund yvir trý ár.

# ÍSKOYTI: SÁLARHEILSAN HJÁ BØRNUM

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum tilmæli havt fokus á at skipa eitt tilboð til tey ungu og vaksnu við sálarligum avbjóðingum, men tað er eisini neyðugt at veita børnum betri tilboð um sálarfrøðiliga viðgerð. Í Heildarætlanini fyri sálarliga heilsu í Føroyum verður víst á, at alt fleiri børn og ung stríðast við angist og tunglyndi ella aðrar sálarligar avbjóðingar, sum ávirka gerandisdagin og menningina skeiva vegin.

Gongdin sæst eisini aftur hjá Sernámi og í Barna- og ungdómspsykiatriini, sum síggja fleiri børn og ung, ið hava tørv á viðgerð fyri lættari til moderatar sálarligar avbjóðingar. Víst verður á, at í dag er neyðuga viðgerðin ikki tøk, tí tað tykist sum um, at børn og ung, ið stríðast við lættari sálarligar avbjóðingar, detta niður ímillum skipanir. Sernám hevur bert eina ráðgevingarskyldu, men ikki skyldu at veita viðgerð, og samstundis verða børnini ikki mett at vera nóg illa fyri til at fáa viðgerð í Barna- & ungdómspsykiatriini.

Avleiðingin av, at tey ikki fáa røttu hjálpina rættstundis kann verða, at børnini menna svárari sálarliga avbjóðingar, sum kunnu ávirka menningina alt lívið. Neyðugt er tí at menna eitt tilboð, sum loftar hesum børnum og ungu.

Arbeiðsbólkurin metir, at stórur tørvur er á fleiri sálarfrøðiligum tilboðum til børn og ung og avvarðandi teirra og mælir til, at skipað verður tilboð, sum skal tryggja at hesin bólkurin av børnum og ungum fáa hjálp og viðgerð tíðliga. Málið skal vera, at uppgávan og viðgerðin verður veitt har, hon ger størstan mun hjá tí einstaka.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at eitt serligt tilboð við ókeypis sálarfrøðiligari viðgerð til børn og ung undir 15 ár verður skipað. Hetta kann gerast við at útbyggja verandi skipanir – t.d. við at gera tað møguligt hjá øllum fólkaskúlanæmingum at fáa ókeypis sálarfrøðiligar samrøður. Ein annar møguleiki er at gera eitt tvørfakligt tilboð, savnað á einum stað, við fokus á tey børn, ið stríðast við lættar til moderatar sálarligar trupulleikar, og teirra avvarðandi, ið ikki verða hjálpt av núverandi almennu tilboðunum. Ein nýggjur arbeiðsbólkur eigur at verða settur til hesa uppgávu.